Blaðið eigur ein at vissa sær á posthúsinum.

SOSIALURIN

FRÆLSI JAVNAÐUR BRØÐRALAG

NR. 49
MIKUDAGIN
15. JULI 1964
37. ÁRG.

LANDSDYSTIR

Ísland—Føroyar

Landsdystur á fyrsta sinni í hondbólti fyri menn

Fríggjadagin koma íslendsku landsliðspælararnir við flogfari til Føroya at leika móti føroysku landsliðunum, bæði í hondbólti og í fótbólti.

Hetta verður fyrsta ferðin, at Føroyar spæla landsdyst í hondbólti.

Feløgini hava fyrr spælt móti fremmandum liðum undanfarnu ár og tað kann sigast, at vit hava staðið okkum hampuliga væl.

Men hesaferð er eisini at minnast til, at Íslandi hoyrir til verðins, elituna innan hondbóltin.

Teir vunnu t.d. í vetur á nr. 2 í heimsmeistaraskapinum, á Svøriki.

Spennandi verður at vita hvussuleiðis okkara menn fara at standa seg. Hóast vit kanska ikki skulu vænta okkum tann stóri sigurin, so verður tað tó forvitnisligt at vita hvussu væl Føroyar koma at standa seg.

Hondbóltslandsliðið

Nógv ítróttaráhugaði hava seinastu tiðina gitt og mett um hvussu tað fer at verða, og hvørjir teir vera, sum skulu umboða Føroya ítrótt í landsdystunum í ár.

Mannbjørn Mortensen fekk til uppgávu at seta hondbóltslandsliðið. Tað verða 11 leikarar — — leikað verður við útskifting og verða spælararnir hesir: 6 úr Kyndli — 4 úr VÍF og 1 úr Neistanum.

MÁLMENN:
Andreas Jacobsen (Kyndil)
Jóannes Bjørgvin (VÍF)

HINIR LEIKARARNIR:
Hans Mortensen (Neistin)
Steinbjørn Zachariasen (VÍF)
Jóan Petur Midjord (Kyndil)
Kári Nielsen (VÍF)
Sverri Jacobsen (Kyndil)
Petur Sigurd Rasmussen (Kyndil)
Jonny Joensen (VÍF)
Heðin Mikkelsen (Kyndil)
Torbjørn Mikkelsen (Kyndil)

Spælararnir fáa allir landsliðsnálina í silvur, tað er sama nálin, sum verður givin fyri hondbólt. Av leikarunum hava Sverre Jacobsen og Petur S. Rasmussen framman undan silvurnálina.

DYSTURIN VERÐUR LEYGARKVØLDIÐ

Landsliðsdysturin verður komandi leygarkvøld kl. 19,00. Dysturin verður lagdur so mikið seint á degi fyri at avbygdafólk eisini skal hava høvi at koma til Havnar at siggja dystin, tá áhugin tykist verða so stórur at sleppa at siggja dystin.

Atgongupeningurin verður kr. 7 fyri vaksin og kr. 2 fyri børn.

(Framhald á 2. síðu)

Smirlamálið einaferð enn

»DAGBLAÐIÐ« VÁTTAR HELDUR ENN AVSANNAR EITT EIN ASTA ORÐ AV TI, VIT HAVA SAGT

Vit søgdu tað vera óregluligt at taka tilboðið frá Tórshavnar skipasmiðju um gerð av tí nýggja Smirlinum til viðgerðar, tá ið tað var so ófullfiggjað, at tað hevði tikið við bara ein part við av tí, sum var útboðið.

Hesa óreglu váttar Dagblaðið beinleiðis við at seta svart á hvítt í grein tað skrivar til verju fyri landsstýrið og figgjarnevndina, at skipasmiðjan í Havn hevði bara givið tilboð uppá ein part — um kr. 3,3 milj. og bara nevnt hinar lutirnar, ið ikki vóru við í tess tilboði uttan at uppgeva prísir. Harafturímóti hevði Skála Skipasmiðja givið eitt bindandi fullfiggjað tilboð uppá kr. 4,7 milj. kr.

Vit søgdu tað vera óregluligt at taka við tilboði frá Tórshavnar skipasmiðju uppá hesar lutir aftaná at hitt samlaða tilboði frá Skála var vorðið almannakunnugt, tí vitandi um hitt samlaða tilboðið frá konkurrentinum var tað sum fótur í hosu hjá Tórshavnar skipasmiðju at leggja hesar prísir so lágar, at tað fyrra og tað seinra tilboðið frá henni tilsamans komu at verða eitt sindur biligari enn tilboðið frá Skála.

Sannleikan av hesari frágreiðing orkar Dagblaðið í sini roynd at umbera ikki at rongja, men verður í skriving síni einans at geva eina staðfesting og váttan av tí, sum vit søgdu.

Vit søgdu tað vera óregluligt at Kjartan Mohr stjórin á Tórshavnar skipasmiðju sum persónliga sterkt interesseraður í figgjarnevndaravgerðini nýtti sín rætt sum figgjar-

(Framhald á 2. síðu)

Fáa nógva sild

Leygardagin og fyrstu dagarnar í hesi vikuni hava íslendingar fingið heilt nógva sild, mesta sum fingið er í ár.

120 skip sigldu inn mánadagintey góvu tilsamans 112.000 upp, summi í tunnum og summi í málum. Hetta er besta veiðan higartil í ár.

Teir siga annars at ójavnt er, sum sildin er til støddar.

Verður løgtingsval?

Hetta er spurningur, ið ofta verður havdur á lofti millum manna. Tað tykist, sum rættuliga sterkar vónir eru knýttar at hesum spurningi; tí tað er einki loyndarmál, at vanliga fólkahugsanin er tann, at hetta landsstýrið litið og einki hevur avrikað; men tvørturímóti á mangan hátt verið eitt stórt vónbrot, serstakliga fyri hina arbeiðandi fjøldina, sum alsamt má knógva undir vánaligari og vánaligari livilikindum.

Millum flokkslimir hjá samgonguflokkunum er henda sama vónin vorðin meir og meir opinlýs, ikki bara millum teirra, ið ongatið hava hildið av samgonguni; men eisini teirra millum, sum sóu gull og grønar skógir, bara tí hetta stýrið skýrdi seg við heitinum »sjálvstýrislandsstýrið« — men so visti tað seg, at hetta var einki gandaorð, allraminst hvat meira sjálvstýri viðkom.

KLAKKSVÍK:

Danska figgjarnevndin vitjar

Seinasta hósdag — tó nógv seinkað av m.a. vitjanini á Dimun — kom danska figgjarnevndin, innanrikisráðharrin o.a. til Klakksvíkar, har farið var til borðhald hjá søknarstýrstýrinum kl. 8 á kvøldið.

Yvir 100 fólk vóru komin til steðar til veitsluhaldið hjá søknarstýrinum, sum hevði latið Erik Olsen í hendi at fáa í lag hitt frálíka borðhaldið, har einki fattaðist av alskins góðum mati, víni og øðrum leskidrykkjum.

Veitslulagið var av tí besta við røðuhaldi og sangi. Aftaná borðhaldið varð farið uppá gólvið.

Poul J. Olsen, søknarstýrisformaðurin bjóðaði vælkomin og talaði seinni fyri søknarstýrið. Karsten Hoydal, landsstýrismaður, talaði fyri landsstýrið. Aðrir, ið høvdu orðið frá føroyskari síðu vóru Jóhan Nielsen, fólkatingsmaður og Sámal Petersen, løgtingsformaður.

Gottschalk-Hansen, prestur og fólkatingsmaður flutti røðu fyri figgjarnevndina. Sjálvt um hann er konservativur, hevði hann mong og góð rósandi orð at bera Jóhan Nielsen fyri hansara mikla ágrýtni og frálíka umboðsskap sum føroyskur fólkatingsmaður. Vinstrimaðurin Henry Christensen helt røðu fyri konufólkunum, sum teir høvdu saknað aðrastaðni, teir høvdu vitjað. Lars P. Jensen, innanrikisráðharri, setti sín serliga dám á samkomuna, tá hann einsamallur bar fram sangin um dóttur myllarans. Carl Petersen, figgjarnevndarformaður, takkaði fyri góðan blíðskap

Sama dagin skuldu teir havt vitjað Christianskirkjuna, sjúkrahúsið og okkurt virki; men hetta mátti steðgað til dagin eftir, tá teir komu so seint.

Fríggjadagin um middagsleitið gekk leiðin til Viðareiðis, har teir hugdu at tí nýggju lendingini í Eiðsvík og teimum miklu gerðunum í bygdini.

Samkoma var í skúlanum, har søknarstýrið var vertur.

Fýra bilar útav

MANNSSKAÐI OG STØRUR MATERIELLIR SKAÐAR

Seinasta vikuskifti var nógv ferðsla úr Havn norður á Oyggi og til Vestmanna. Hóast sýslumaðurin hevði kunngjørt, at koyrast mátti varliga, hendu nakrar ferðslu vanlukkur.

Í Havn fór ein útleigubilur útav vegnum og fekk støran materiellan skaða — har man vera talan um ov skjóta koyring?

Í Kollafjarðardali fór ein bilur útav og ein um Stykkjaleiðina og somuleiðis fór eisini ein bilur útav Oyggjarvegnum.

Í bilinum sum koyrdi útav Oyggjarvegnum tíðliga mánamorgunin breyt ein maður beinið og annar maður fekk skaða í høvdið.

STØRSTU FRAMGONGD

Tann rómverska-katólska kirkjan í Sambandsrikinum hevur nú 44.874.000 limir og veksur triggjar ferðir so skjótt sum tann protestantiska kirkjan.

Toskurin er frá 1956

Sjáldsamt at fáa 10—15 ára gamlan tosk undir Grønlandi.

Poul M. Hansen, fiskivinnufrøðingur sigur, at so nógv verður roynt við Grønlands strendur, at sjáldsamt er at fáa tosk, ið er 10—15 ára gamal.

Meginparturin av veiðuni seinastu árini hevur verið fiskur frá 1956—57.

Grønlendingar kunnu rokna við í komandi tíð at fáa góða laksaveiðu, heldur Poul M. Hansen.

25 merktir laksar eru veiddir, tveir av teim vóru merktir í Svøriki, 8 í Bretlandi og hevur tað vakt miklan ans, at hesir merktu laksar eru veiddir undir Grønlandi.

HART MILLUM GOLDWATER OG SCHRANTON

Schranton, ið ætlar sær at verða forsetavalevni hjá republikanska flokkinum í Amerika, hevur skrivað Goldwater, sum menn vænta fara at verða valevni flokksins, strangt brævi, hann sigur m. a.:

Politikkur Goldwaters er løgin og vandamikil, soleiðis at amerikanska fólki ikki vil hava nakað við henda politikk at gera — og fara eisini at vísa tað á valdegnum

Goldwater rekur ein vitleysan og uppblástan politikk.

Spurningurin verður, um landsfundurin fer at kjósa sær tað valevni, sum størsti parturin av veljarafjøld flokksins vil hava uppstillaðan, ella um landsfundurin fer at kjósa sær tygum sum valevni.

So beiskt er stríðið millum høvuðsmenninar til forsetavalið hjá republikanarunum.

Sum støðan er í dag vænta menn, at veljarar hjá republikanska flokkinum fara heldur at velja Johnson, forseta, enn Goldwater

Vil ikki bera ast fyrr enn 1965

Fyri stuttum vann Floyd Patterson nevaleik móti Eddie Machen í Stockholm. Hetta var lið í roynd ini aftur at vinna sær heimsmeistaraskapið, men nú sigur heimsmeistarin Cassius Clay, at hann ongan nevaleik ynskir móti Floyd, sum hann rópar »harra einki«.

— Eg vil ikki berjast móti hesum ókendu nevaleikarunum, ja, eg rokni ikki við, at eg berjist aftur fyrr enn í 1965.

Annars leggur hann aftrat, at tað kann vera, at hann als ikki tekur lut í nevaleiki á nøkrum sinni aftur, tá hann hevur bestan hug at fara út at prædika — islam — muhammedanismu.

Høvuðsmaðurin aftanfyri Clay vónar tó at fáa í lag ein nevaleik millum Cassius Clay og Sonny Liston, um hesin fær leikloyvi sítt aftur. Hesir kunnu tá væntuliga royna seg um heimsmeistaraskapið í september ella oktober.

VESTANSTEVNAN

Vestanstevnan í Vestmanna kom eisini at vera í góðum summarsveðri. Har vóru fleiri góðir ítróttar dystir. Hóast vit til stevnurnar serliga hugsa um róðurin, so var ein onnur kapping, ið hevði stóran áhuga hjá fólki. Tað var hondbólts dysturin millum VÍF I og Kyndil I.

Úrslitini av vestanstevnuni:

KAPPRÓÐUR

4-mannafor — gentur:
2. Silið, Tórshavn
1. Skurin, Gotu
3. Erla Kongsdóttur, Fuglafirði

Fipan Fagra kom skeivt fyrl — og kom ikki á mál.

Gomul 4-mannafor:
1. Blikur, Kvívík
2. Broddur, Sunnbæ
3. Heykur, Kolbeinagjógv (mannaður við havnadr.

Gomul 6-mannafor:
1. Smiril, Vágur
2. Greivin, Kollafirði
3. Falkurin, Hósvík

4-mannafor — dreingir:
1. Havfrúgvin, Vestmanna
2. Tjaldur, NSÍ
3. Síli, Tórshavn
4. Ørnin, Sandavágur
5. Fipan Fagra, Klakksvík
6. Ternan, Toftir
7. Beinta, Miðvágur
8. Erla Kongsdóttur, Fuglafirði
9. Falkur, Vági
10. Dúgvan, Sørvág

8-mannafor:
1. Sølmundur
2. Toftabáturin
3. Miðvingur
4. Nevið Reyða
5. Strandingur
6. Skúgvurin, Sandavág
7. Ørvur

10-mannafor:
1. Sunnbingur
2. Klakksvikingur
3. Nýggi Vestmenningur
4. Suðringur
5. Eystringur
6. Havnabáturin
7. Vágbingur
8. Fuglfirðingur
9. Studenturin
10. Gamli Vestmenningur

Tað var spennandi kappróður á Vestanstevnuni í Vestmanna. Mesta partin av róðrinum hjá 10-mannaførunum stóð tað millum Nýggja vestmenningin og Klakksvíkingin — men sum ikki fyrstu ferð — Sunnbingurin skjeyt seg fram mótl endanum — og vann. Tað sama hendi at kalla á Varmakeldustevnuni.

HONDBÓLTUR

Old girls (Neistin) — Old girls (VÍF 6—3.	
Old boys (Neistin) — Old boys (VÍF 6—5.	
Kyndil—VÍF (smádr.lið	12—10
EB—VÍF (smágentulið	4—3
VÍF—SÍF (II. mannslið)	17—12
VÍF—Neistin (I. kvinnulið)	11—8
Kyndil—VÍF (I. mannslið)	32—17

Oskrottin

Landskappingardystir um vikuskiftið í Havn:

Kyndil, menn I — TB	45—4
Kyndil, kv. I — Stjørnan	8—0
Kyndil, kv. II — Stjørnan	1—1
B36—KÍ (dreingir)	4—1
HB II.—IF	9—0
HB—TB (meistaradeildin)	6—2

Sostatt er HB vorðið meistaralið í ár

Kappingin kom ikki at fylgja skránni av tí at KÍ fór úr kappingini.

Annars komu liðini at standa seg soleiðis:

HB 6 stig
B36 4 stig
TB 2 stig